# Holte tapti

**Á pappírinum átti Skovbakken ikki at skapt teir stóru trupulleikarnir fyri Bárður & Co., men enn tykjast steypavinnararnir als ikki at hava fingið neyðugu ferðina í endaspælinum**

FLOGBÓLTSÚTISETI
*Jákup Mørk*

Bárður B. Mikkelsen og liðfelagarnir í Holte mistu eitt týdningarmikið fet, tá teir sunnudagin á heimavølli máttu lúta fyri Skovbakken Volley úr Århus.

Skovbakken fekk undan hesum árinum tríggjar amerikanskar leikarar á liðið, og tó at tað hevur tikið sína tíð at fáa spælt hesar inn, so er úrslitini vorðin betri og betri.

Og besta úrslit teirra fram til nú mundi so vera, tá teir sunnudagin bastu Holte. Fyrstu løtuna var annars ikki líkt til, at Holte skuldi hava teir stóru trupulleikarnar, men eftir at hava tikið fyrsta sett, stóð stilt hjá heimaliðnum.

Sjálvur sigur Bárður Mikkelsen, at spælið hjá Holte í dystinum mundi vera tað vánaligast avrikið, sum liðið hevur sýnt í ár.

- Vit gjørdu alt ov nógvar persónligar ferðir, og tó at vit vóru væl við í flestu settunum, so kiksaðu allir teir avgerandi bóltarnir, og hendan møguleikan lat Skovbakken ikki fara framvið sær.

Fyri Holte merkir tapið, at teir longu nú eru fýra stig aftan fyri HIK Aalborg, sum er á fremsta sessinum við fullum stigatali eftir fyrstu fýra dystirnar.

VB-Neistin 25-19 (13-9):

# VB í finaluni

**Fyri triðju ferð innan fýra ár eru VB-kvinnurnar partur av Coca-Cola finaluni. Eingin ivi var um samlaða vinnaran, tá Neistin var á vitjan leygardagin**

COCA-COLA KAPPINGIN, KVINNUR
*Jákup Mørk*

VB hevði longu tryggjað sær eina fýra mála stóra leiðslu undan seinnu hálvfinaluni móti Neistanum, og tí var kanska eisini væntandi, at tað skuldu gerast tær, sum endaðu í finaluni. Ikki minst um hugt verður at støðuni í landskappingini, har VB framvegis er oddalið, meðan Neistin hinvegin hevur tað sera tungt í løtuni.

### Gjørdu skjótt av

Og tað var sum so ongan tíð nakar ivi um, hvat liðið var hitt betra, tá spæld varð leygardagin. Longu eftir fyrstu tíggju minuttunum ella so hevði VB lagt seg á odda við einum fýra málum, og so ráddi fyri tað mesta um at halda fast.

Hetta eydnaðist eisini uttan stórvegis hóvasták, soleiðis at VB til tíðir kundi taka sær meira av løttum, og heldur bara dúva upp á tey skjótálop, sum buðust, tá Neistin framdi mistøk í royndunum at vinna seg uppeftir á máltalvuni.


*Við einum tryggum sigri á Neistanum í seinnu hálvfinaluni staðfestu VB sítt triðja finalupláss innan fýra ár. Enn hava tær tó fyrsta Coca-Cola sigurin til góðar*

Mynd: Áki Bertholdsen

Við ivaleysa samlaða sigrinum syrgdu VB samstundis fyri, at tær nú fyri triðju ferð innan fýra ár eru partur av steypafinaluni hjá kvinnunum. Hinar báðar ferðirnar hevur tað tó verið so sum so við úrtøkuni, tó at tað bert var eitt einstakt mál, sum skildi partarnar, tá Kyndil í 2000 tók sær av steypinum.

Útlitini fyri einum góðum úrsliti hava tó ongan tíð verið betri, enn tey eru í ár, nú VB eisini er oddalið í landskappingini, og fyri teirra viðkomandi er stórt sæð bara at bíða, soleiðis at vissa kann fáast fyri, hvørt tað verða VÍF ella Stjørnan, sum verður mótstøðuliðið.

### Dysturin í tølum

**VB-Neistin 25-19 (13-9)**
VB í finaluna við samanlagt 44-34
Málskjúttar:
VB: Gurið Mortensen 6, Arnleyg Hjelm 6, Daiva Toumaite 4(2), Rannvá Augustinussen 3, Reda Kurkauskiene 2, Eyðbritt Krosslá 2, Eydis Kjærbo 2
Neistin: Christina Holm 4, Simona Dziugyte 3, Lív Sørensen 3, Mildrið Jacobsen 2, Susan Brockie 2(2), Súna Mørk 1(1), Rakul Augustinussen 1, Anna Clementsen 1, Ása á Neystabø 1, Vivian Unadóttir 1
Brotskøst: VB 5, Neistin 4
Útvísingar: VB 1, Neistin 1
Dómarar úr Kyndli: Ragnar Simonsen & Eyðun Samuelsen

Tjaldur-KÍF 25-27 (15-15):

# Kollfirðingar ota seg upp

**Við sigrinum á Tjaldri lupu kollfirðingar bukk um Kyndil, soleiðis at tað nú eru teir, sum eru á fjórða plássinum á stigatalvuni**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Síðani KÍF tíðliga í heyst fekk tríggjar útlendskar leikarar á liðið, hevur spakuliga gingið rætta vegin fyri teirra viðkomandi. Vánaliga úrtøkan fyrstu dystirnar gjørdi sítt til, at liðið ongan tíð fekk togað seg heilt nær oddaliðunum, men nú stigini eru býtt í tvey undan endaspælinum, tykist liggja betri fyri í so máta.

Og sunnudagin fekk KÍF eitt stórt skump rætta vegin í so máta. Ikki bara vunnu teir útidystin móti Tjaldri, men tá bæði Neistin og Kyndil samstundis taptu sínar dystir slapp KÍF eitt pláss upp á stigatalvuni, samstundis sum munurin upp til bronsumerkini minkaði niður í tvey stig.

### Landsliðsbrotskøst

Hóast kollfirðingar vóru favorittar at vinna dystin í Runavík, so tók tað tó drúgva tíð, áðrenn hendan staðfestingin gav úrslit á máltalvuni. Allan fyrra hálvleik leikaði sera javnt á millum liðini, og líka mikið hvussu kollfirðingarnir royndu, so var trupult at finna vegin framvið Dejan Lacok í tjaldursmálinum. Og tó at tað eydnaðist at skap eitt hol í í seinna hálvleiki, so mundi tað kennast ikki sørt ørkymlandi hjá gestunum, at málverjin framhalandi stóð seg somikið væl. Ikki færri enn fimm ferðir eftir steðgin hevði KÍF møguleikan úr sjey metrum, men so hvørt sum hesi vórðu misnýtt, tykist tað merkisvert, at eingin kollfirðingur er á landsliðnum, har misnýtsla av brotskøstum tykist vera ein fortreyt fyri at vera við.

Mongu bjargingarnar frá málverjanum hildu eisini Tjaldri í dystinum, og fram móti dystarenda var eisini líkt til, at hetta kundi bjarga teimum í øllum førum annað stigið. Tveir minuttir fyri leiklok stóð nevnliga framvegis á jøvnum, eftir enn tvey misnýtt brotskøst, men við tveimum treiskum málum frá Jónálvi Johannesen eydnaðist kortini KÍF at tryggja sær sigurin.

Sum sagt, so viðførir hetta, at KÍF nú er á fjórða plássinum á stigatalvuni, og so er spurningurin, hvussu stórum álvara hetta skal takast í. Ein greið ábending um hetta fæst ivaleyst komandi sunnudag, tá Neistin kemur á vitjan í Hoyvíkarhøllini. Megnar KÍF eisini at vinna tann dystin, eru teir av álvara við í heiðursmerkjastríðnum, meðan eitt tap hinvegin viðførir, at liðið mest sum endaligt verður sett uttanfyri.

### Dysturin í tølum

**Tjaldur-KÍF 25-27 (15-15)**
Málskjúttar:
Tjaldur: Sverri Justinussen 6, Dragisa Stojovic 6, Jens Martin Knudsen 5(1), Mortan Hansen 4(1), Tórhallur Thomsen 3, Zoran Sarcevic 1
KÍF: Petur Martin Poulsen 7, Damir Oros 6, Mirko Milenkvic 4, Hallur Hansen 4, Jónálvur Johannesen 3, Kristjan Madsen 2, Vagnur Johannesen 1
Brotskøst: Tjaldur 4, KÍF 8
Útvísingar: KÍF 1
Dómarar úr Neistanum:
Kristian Johansen & Sámal Hansen



# Jón Rói framvegis í bíðstøðu

**Enn er einki endaligt avklárað um, hvørt føroyski landsliðsleikarin skal skifta status til superliguleikara**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað gekk sum rótasúpan allan fríggjadagin í farnu viku, at Jón Rói Jacobsen var á veg til Brøndby. Tíðindini vórðu eisini partvíst váttað av leiðsluni í HB, sum segði, at at samband hevði verið millum partarnar, men at enn var einki endaligt avklárað.

### Í bíðistøðu

Og sambært stjóranum í P/F Havnar Fótbóltur, so er støðan framvegis hin sama.

- Síðani fríggjadagin er einki broytt. Vit hava sum sagt tosað við Brøndby nakrar ferðir, og í løtuni liggur bólturin so hjá teimum, segði Steinfinnur Mittelstein, formaður í HB, tá vit fingu orðið á hann fyrrapartin mánadagin.


*Fyrrapartin mánadagin var framvegis einki svar at fáa um framtíðina hjá Jón Róa Jacobsen. Saman við HB bíðar hann í løtuni eftir Brøndby, sum nú hevur bóltin*

Spurdur, nær hann roknar við at hoyra nakað nærri um leikaraskiftið, sigur Steinfinn, at tað dugir hann ikki at siga.

- Tað kann eins væl verða í dag sum í morgin, men hinvegin kann eisini ganga longri tíð enn so. Tað er ikki altíð so lætt at fáa avgreitt tingini, tá slíkir handlar skulu gerast, og fyri okkara viðkomandi ræður einamest um at vera tolin, og annars hava ís í búkinum, tá endaliga støðan skal takast.

Sostatt er í fyrstu atløgu líkt til, at bæði HB og Jón Rói Jacobsen mugu brynja seg við toli, og so er spurningurin bara, hvussu leingi hetta skal vara. Enn tykjast onnur feløg ikki at vera beinleiðis í myndini, men tað er ikki óhugsandi, at um einki hendir innan alt ov langa tíð, so kunnu aðrir møguleikar koma upp á tal.

### Helst leigumál

Tað hevur eisini verið gitt dúgliga, hvørt talan skal vera um, at HB selur Jón Róa til Brøndby, ella um talan í fyrstu atløgu skal vera um leigumál, men heldur ikki hesum spurninginum dugir Steinfinn at svara.

- Eg kann sum so als ikki úttala meg vegna HB í hesum føri. Men sjálvur kundi eg ímyndað mær, at talan í fyrstu atløgu verður um leigumál. Talan verðru jú um leigumál hjá Peter Madsen, nú hann fer avstað, og tí vildi tað mest logiska helst verið, um talan eisini verðr um leigumál við Jón Róa.

Stjórin sigur tað ikki, men tað er lítið at ivast í, at hóast talan í fyrstu atløgu »bert« verður um leigumál, so skulu allir smálutir við eini møguligari sølu helst fáast upp á pláss áðrenn hetta verður veruleiki.

Vanligt er í øllum førum, at felagið, sum lænir leikara, samstundis tryggjar sær eina optión ella forkeypsrætt til ein frammanundan avtalaðan prís. Hetta er jú eisini neyðugt, um feløgini skulu leggja framtíðarætlanirnar við hópinum longur enn hálvt ár fram í tíðina, og tað er eingin loyna, tað er júst tað, sum flestu feløgini royna.


*Todi Jónsson vil einki siga um, hvørji feløgini eru, sum hava sýnt honum áhuga*

# FCK-málverji í Onglandi

Eins og Todi Jónsson noyðist FCK-málverjin, Rune Pedersen, nú at leita sær eftir nýggjum felagi. Hetta tí hann og FCK ikki kundu koma ásamt um nýggjan sáttmála.

Og okkurt bendir á, at tað higartil hevur hepnast væl hjá Rune Pedersen í so máta. Hesa vikuna skal hann í øllum førum til royndarvenjingar hjá enska stórfelagnum, Chelsea, sum í løtuni leitar eftir einum eykamálverja fyri italska Carlo Cudicini. Enska transfer-vindeygað stongir longu fríggjadagin komandi, so um ein handil skal gerst veruleiki, verður tað helst innan inniverandi vikan er runnin.

Hjá Toda Jónsson valdar framvegis stór óvissa um framtíðina. Hóast tað bert hevur verið italska Perugia, sum hevur verið nevnt við navni, so ljóðar tað í donsku miðlunum, at fleiri útlendsk feløg hava sýnt áhuga.

Á heimasíðu síni sigur Todi eisini sjálvur, at hann hevur havt fleiri fyrispurningar, men enn heldur hann kortini nær at kroppinum, tá spurt verður um navn á einum møguligum nýggjum felagi.

**-jm**

# Judo-kapping

Eitt umfar í liðkappingini í judo varð leikt í Eysturskúlanum í Havn sunnudagin.

Sum vant vóru tað tey bæði, Havnar og Sunda Judofelag, sum tóku lut, og varð kappast í aldursbólkinum, unglingar og dreingir.

Úrslitini úr kappingini vóru hesi:
Unglingar:
HJF - SJF 2-1

Dreingir:
HJFa - HJFb 4-1
HJFa - SJFa 4-1
HJFb - SJFa 1-3


*Havnar Judofelag gjørdi bart, tá eitt umfar í liðkappingin í judo varð leikt sunnudagin*

Mynd: Sofus Johannesen

# Finaludómararnir eru settir

**Tað verða Kristian Johansen og Sámal Hansen, sum fara at døma mansfinaluna í Coca-Cola kappingini í hondbólti. Eyðun Samuelsen og Hannis Wardum døma kvinnufinaluna**

STEYPAFINALA
*Jákup Mørk*

Enn eru tað bert kvinnurnar hjá VB, sum hevur tryggjað sær atgongd til finaluna í Coca-Cola kappingina í hondbólti, men hóast hinir tríggir finaluluttakararnir ikki verða funnir fyrr enn seinni í vikuni, so er longu nú greitt, hvør skal døma finaludystirnar.

### Gevur seg sjálvt

Vanliga verða dómaraásetingarnar ikki gjørdar, fyrr enn finaluliðini eru funnin, soleiðis at dómarar ikki koma at døma leikarar úr teirra egna felagi, men í ár gevur dómaraásetingin seg sjálva í so máta.

Hjá monnunum er nevnliga longu greitt, at Neistin ikki verður annar parturin í finaluni, eftir at teir mistu sín møguleika móti næst bestu kollfirðingunum. Somu kollfirðingar fingu av at vita frá Kyndli í fyrru hálvfinaluni millum liðini, og tí er mest sum greitt, at Kyndil verður annað liðið. Tað ger so, at dómaraparið hjá Kyndli neyvan kann døma hendan dystin, og so stendur valið í veruleikanum ímillum pørini hjá Tjaldri og Neistanum. Runavíkingarnir hava tó tann trupulleikan, at nú fótbóltsvenjingarnar eru byrjaðar, liggur ikki fyri hjá teimum at døma leygardag, og tí fellir luturin á Kristian Johansen og Sámal Hansen. Ein annar møguleiki kundi verið dómaraparið hjá TB, sum nú veruliga fer at leggja til brots, eftir at teir einans hava dømt dystir í Vági í eitt ar, men teir mugu so bíða á hesum sinni.


*Hannis Wardum – sum í ár dømir saman við Eyðuni Samuelsen – kann ikki døma mansfinaluna í ár, tí hann umboðar Kyndil, sum verður annar parturin í finaluni, men tað er væl hugsandi, at slík kriteriir ikki verða galdandi komandi kappingarár*

Tá so er, so gevur tað seg nærum eisini sjálvt, at tað verða Hannis Wardum og Eyðun Samuelsen, sum døma kvinnufinaluna. Í fjør dømdi Hannis mansfinaluna saman við beiggjanum, Una, og í ár verður tað so kvinnufinalan, sum verður á skránni.

### Seinastu ferð

Annars er hetta kanska seinasta ferðin, at tað verður tilknýtið til ymsu feløgini, sum ger av, hvat dómarapar verður sett at døma ymsu dystirnar.

Fyri tveimum vikum síðani skrivaðu vit, at dómararnir nú hava ætlanir um at taka seg saman í felag, og eitt av endamálunum við hesum skal ætlandi vera, at dómararnir komandi ár umboða dómarafelagið og ikki ávíst hondbóltsfelag. Akkurát, hvussu lagnan verður við hesum, veldst millum annað um, hvørjar avgerðir verða tiknar á aðalfundinum hjá HSF.